# – tey eldru út



**TEY UNGU**

*- Malan hevur ivaleyst hugsað um tíðina, tá Lükka og eg fluttu út í Koltur, og genturnar vóru eftir í Kirkjubø. Prísurin fyri at lata børnini fara av oynni er ov høgur. Malan vildi gjarna royna hetta, men hon og maðurin hava í hesum tíðarskeiði ásannað, at framtíðin hjá teimum ikki liggur í Koltri, sigur Bjørn Patursson*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

aftur. Í Koltri liggur eitt stórt arbeiði, sum skal gerast – eitt arbeiði, tú einki fært fyri, men sum er serstakliga áhugavert. Skjøtil er settur á, og okkara uppgáva verður nú at fremja ætlanina við Tjóðgarðinum í Koltri í verki.

### Vildu royna

Men hví flyta ungu hjúnini so úr aftur Koltri eftir so stuttari tíð?

- Lükka og eg eiga tvær gentur, og av teimum er tað Malan, sum hevur víst landbúnaðinum størstan áhuga og nam sær tann førleika, sum krevst fyri at taka á seg eitt festi. Men hvørgin av gentunum búði í Koltri tey árini, Lükka og eg høvdu garðin. Vit kunnu siga, at tað vóru vit, sum fluttu út frá gentunum úr húsum okkara í Kirkjubø. Tær vóru fyri tað mesta inni á meginøkinum og komu bert út í Koltur at ferðast.

- Bjørn sigur, at tá tað gjørdist greitt, at hann fór í stjórastarvið á Búnaðardeplinum, høvdu Malan og Petur hug at royna seg í Koltri.

- Nú tey hava verið har úti í hesum tíðarskeiði, hava tey sæð, at Koltur kortini ikki er akkurát nakað fyri tey. Tey komu at tosa um hetta um jólini, og í februar í ár gjørdu tey endaliga av, at tey vilja lata festið frá sær aftur og flyta úr Koltri.

Malan og Petur eiga trý børn, Sjúrð, sum er 10 ár, Jóan Paula, sum er 9 – og so lítlu Mariu, sum er eitt ár.

- Eg trúgvi, at ungu hjúnini hesa tíðina hava sæð, at tað er ikki tað sama at koma út í Koltur at ferðast, sum tað er at gerast festari og sita við ábyrgdini.

Bjørn vísir á, at lærari hevur verið knýttur at Koltri eftir eini góðari skipan, soleiðis at Sjúrður og Jóan Pauli hava fingið sína skúlagongd, men skjótt hevði tíðin komið, har teir høvdu verið noyddir inn á meginøkið í skúla.

- Malan hevur ivaleyst hugsað um tíðina, tá Lükka og eg fluttu út í Koltur, og genturnar vóru verandi eftir í Kirkjubø. Hon og maðurin hava ivaleyst hildið, at kostnaðurin fyri at lata børnini fara av oynni hevði verið ov høgur. Malan vildi gjarna royna hetta, men tey hava í hesum tíðarskeiði ásannað, at framtíðin hjá teimum ikki liggur í Koltri.

### Sannføringar

At Malan og Petur vilja av aftur garðinum í Koltri, merkir tó ikki, at tú noyðist úr starvinum sum búnaðarstjóri og útaftur í Koltur?

- Nei, tað er rætt. Tað, sum gjørdi, at eg tók endaligu avgerðina, er, at eg mátti velja ímillum at lata garðin upp í fremmandar hendur – ella, at fara útaftur og halda fram við tí arbeiði, sum er byrjað. Skalt tú vera í Koltri, er neyðugt, at tú gongur 100 prosent upp í tað arbeiði, sum liggur í hesi avbjóðing.

Bjørn Patursson ásannar, at ætlan hansara var, at starvið sum búnaðarstjóri skuldi vera hansara seinasta "arbeiðskarriera" innan landbúnaðarvirksemi í Føroyum, sum hann tekur til.

- Vit trivust so serstakliga væl í Koltri, og nú alt bendir á, at leiðin ber útaftur, eru vit bæði, Lükka og eg, sannførd um, at avgerðin er røtt. Tá eg fekk starvið sum búnaðarstjóri, royndi eg at sannføra meg sjálvan um, at tíðin ivaleyst var komin at fara úr Koltri og royna okkurt annað – eisini tí, at eg var farin um tey fimmti. Nú royni eg av nýggjum av sannføra meg um, at skulu vit útaftur í Koltur, so má tað vera nú – og áðrenn árini gerast ov mong, sigur hann brosandi.





**ERRIN STJÓRI**

*- Eg føli framvegis, at eg havi nógv at geva føroyskum landbúnaði, men vit hava nóg dugnalig fólk eftir á deplinum at føra verkið víðari. Hesum partinum stúri eg slett ikki fyri, sigur Bjørn Patursson, sum var ein errin maður, tá hann fekk litið upp í hendurnar at gerast búnaðarstjóri í Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Búnaðarstjórin sigur, at hann framvegis følir, at hann hevur nógv at geva føroyskum landbúnaði, men sum hann nevndi fyrr í samrøðuni, eru dugnalig fólk eftir á deplinum í Kollafirði at føra initiativið og kann avhenda festibrævið til annan persón. Sambært lógini skal so Búnaðarstovan góðkenna nýggja festaran.

Nú Bjørn sjálvur er búnaðarstjóri, verður hann ikki partur av hesi viðgerð og avgerð.

- Nei, tað verið eg ikki – sjálvsagt ikki, og tí liggur málið nú í Fiskimálaráðnum og hjá aðalstjóranum, Rógva Reinert. Koltur er eitt serstakt mál, tí her liggja stórar ætlanir fyri framman, har okkara fornfrøðiligu mynnýggjan stjóra, samstundis sum eg gerist festari aftur í Koltri. Enn situr dóttir mín, Malan, við festinum og soleiðis eisini við ábyrgdini, og í løtuni veit eg ikki at siga, nær tey formellu viðurskiftini eru komin upp á pláss.

### Bestu árini

Bjørn Patursson sigur, at hann og Lükka gleða seg til at koma útaftur í Koltur, nú avgerðin er tikin.

- Tað er eingin ivi um, at vit hava havt okkara bestu ár í Koltri, og vit vóna, at

> **»** **at gerast búnaðarstjóri er eftir mínum tykki tað ultimativa innan landbúnaðin. Hetta er avgjørt tað hægsta, tú røkkur innan landbúnaðarviðurskifti**
>
> BJØRN PATURSSON

tann partin av verkinum víðari.

### Tað formella

Enn er tó ikki endaliga greitt, hvussu verður hjá Bjørn Paturssyni við starvinum sum búnaðarstjóri og festinum í Koltri.

- Okkara stovnur liggur undir Fiskimálaráðnum og aðalstjóranum, Rógva Reinert. Sambært lóg um landsjørð frá 2007 er tað verandi festari, sum peikar á hin komandi. Tað er soleiðis sitandi festari, sum hevur dugleikar eru partur av øllum tí, sum gjørt verður. Tjóðgarðurin er partur av hesi ætlan, og her hevur Maerskgrunnurin sum kunnugt latið stívliga 5 miljónir krónur til hetta arbeiði.

Bjørn sigur, at í hansara verð liggur málið í stuttum soleiðis:

- Eg havi sagt við aðalstjóran, at eg havi gjørt av at fara útaftur í Koltur og havi soleiðis eisini heitt á Fiskimálaráðið um at finna eina smidliga loysn, soleiðis at stovnurin í Kollafirði fær ein vit nú fáa høvi til at fullføra tað verk, sum skjøtil er settur á við Tjóðgarðinum. Um verkætlanin longu var fullførd, hevði eg kanska sæð øðrvísi upp á tingini. Men nú vilja vit útaftur – við góðum treysti og stórum áhuga fyri oynni og garðinum. Vit trivust frá fyrsta degi, tá vit í sínari tíð komu út í Koltur. Vit høvdu altíð ríkiligt at takast við, og vit keddu okkum ongantíð, sigur 52 ára gamli búnaðarstjórin.

vilmund@sosialurin.fo